# Nøvn

## Føðingar



*23. oktober fingu Anja Eyvindsson Perraud og Alexis Perraud, Lyon, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3430 gr. Hann hevur fingið navnið Leo.*

22. oktober fingu Fríðbjørg P. Justesen og Martin Justesen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3650 gr.

25. oktober fingu Sheila og Firouz Gaini, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3350 gr.

29. oktober fingu Rakul Jákupsdóttir Augustinussen, Hoyvík, og Rógvi Weyhe, Kollafirði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4070 gr.

31. oktober fingu Oda Ingemarsdóttir Højgaard og Jógvan Joensen, Toftum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4040 gr.

31. oktober fingu Tórun og Uri Borentzvige, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2705 gr.

1. november fingu Joan M. Mikkelsen og Carsten H. Jensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4350 gr.

2. november fingu Theresa Niclasen og Kjartan Nielsen, Nólsoy, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3135 gr.

## 25 ára starvsdagur

28. oktober hevði Ejler Johannesen, marknaðarleiðari, verið í starvi hjá P/F Poul Hansen í 25 ár

# Minningarorð um Sólrun Laksáfoss

### f. 27.03.1955 – d. 30.10.2010



Gráar illsligar aldur bróta niðri á Sand. Bróta niðan ímóti fjálga heiminum í Gjógvarátúni, sum hevur mist ein av sínum kæru - Sólrun Laksáfoss gjørdist bert 55 ára gomul, nú hon fór heim.

Lívslagnan hjá Sólrun hevur ikki bert verið merkt av undanvindi. Andróður og tungur kampur gjørdist tíðliga ein barskur veruleiki hjá familjuni Laksáfoss. Bert 44 ára gomul gjørdi kreftin vart við seg. Í apríl ´99 vitjaðu tey bæði Laksáfoss Ríkissjúkrahúsið á fyrsta sinni - og eftir hetta hava tey ofta tikið hesa tungu leið í lívsins stóru óvissu. Vitanin um at vit einki vita, hava Sólrun og Páll merkt tættari upp á sín kropp enn flest onnur.

Sólrun var á mangan hátt eitt sermerkt menniskja, eitt menniskja ið við síni lívsgleði og útstrálan hevur givið okkum so ótrúliga nógv at hugsa um og at takka fyri. Sólrun sannaði og livdi eftir lívssettninginum "bert ein dag, eitt bil ísenn eg fái" hon nýttið hvørt eitt sekund Harrin gav henni - og hennara partur av lívsins vilja lá ikki eftir - ein sermerktur lívsfightari.

Sólrun stríddist, hon misti førleikan, men ongantíð tók hon synd í sær sjálvari, var positiv, segði ofta "at tað eru nógv, sum hava tað verri enn eg".

Sólrun var ein stolt kvinna! Hon fór ikki í hvat sum helst, var altíð væl ílatin, elskaði góð klæðir og smúkkur. Nýliga fekk hon Georg Jensen oyraringar frá Páll, sum hon var serliga glað fyri.

Góði Páll, tú vart við hennara lið øll hesi ár. Títt tolsemi, títt innlit í hennara sjúku og ikki minst tín stóri kærleiki til Sólrun hevði eingin mørk og vart tú hennara eitt og alt - ja, Sólrun'sa "yndlings-laksur", sum hon ofta tók til.

Bárður og Eyðun, tit hava mist eina góða mammu. Bárður, Ebba og Durita tit skula vita, at eg havi ongantíð tosað við stoltari ommu enn Sólrun!

Góða Jannet, tú vart Sólrun so ómetalig góð vinkona. Títt elskuliga lyndi og títt stóra hjarta, fløvaði og ríkaði Sólrun til tað allarsíðsta.

Aldurnar minka niðri á Sand, meðan øll minnini renna fram fyri meg. Hugnaligar løtur hjá Magnu, har børn okkara vóru í pleygu. Páskatúrur til London, Norðoyastevna í Rom, kvinnutúrur í Bulgarien, silvurbrúdleypsdagur tykkara, har vit vaktu tykkum við sangi, tín fimmti ára føðingardag, sum bleiv hildin í Lonini, ja tú vart bert heima til hendan stóra dagin - strævnir dagar við ógvusligari viðgerð vóru fyri framman á Ríkissjúkrahúsinum. Hóast hetta sat tú til háborðs, sá út sum ein drotning og veitslan stendur enn sólaklár fyri okkum.

Okkara tankar fara fyrst og fremst til tín góði Páll og synir tykkara, Bárður og Eyðun, sum hava mist eina góða, fjálga konu og mammu. Lítli ommusonurin hevur mist eina ommu, sum hann ikki fer at minnast. Elenora og Edvard, tit hava mist eina góða systir, og tú Ruth misti eina svigerindu, sum tú altíð var klár at rætta eina hjálpandi hond. Saknurin er stórur hjá familju, vinum, grannum, og annars teimum mongu, sum kendu Sólrun. Harrin styrki tykkum og okkum øll í sorgini.

Við hesum orðum fara vit at lýsa frið yvir minnið um Sólrun Laksáfoss.

**Vinir undir Bláþjørg**

## TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu
og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi,
abbi, sonur, bróðir og verðfaðir

**Berg Rasmussen**
**Sørvágur**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum vóru um hann á
Landssjúkrahúsinum og
Sjúklingahotellinum Hotel Tórshavn.
Tøkk til Ingu Dam, prest.
Tøkk til Holgar fyri vakurt gittarspæl í kirkjuni.
Tøkk til berarar, sangarar, kirkjutænarar, og tykkum
sum hjálptu so væl til við ervinum, og øllum tykkum,
sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til børnini.
Hjartaliga tøkk øll somul.

**Familjunnar vegna**
***Sunrid, Durita, Eyð og Beinir***

†

**Símun Jacobsen**
**Haraldssund, ættaður av Oyrabakka**

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi,
mikudagin, 88 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum
fríggjakvøldið klokkan 18.00.
Jarðarferðin verður úr heiminum leygardagin
klokkan 13.00 í Kunoyar kirkju.

Tey, sum vilja minnast Símun, kunnu lata eina
peningagávu til Niðristovu: Norðoya Røktarheim,
konto í Norðoya Sparikassa.